Føroysk rækjuskip reka royndarfiskiskap í Eysturgrønlandi:

Rækjurnar størri og reyðari og hava ein sterkari smakk

— Hava betri prís á marknaðinum

Tey broytt veðurviðurskiftini í Eysturgrønlandi í ár koma tí føroyska rækjuflotanum væl við. Orsakað av nógvum ísi og vánaligum veðri hevur tó ongantíð fyrr verið munandi fiskiveiða í Eysturgrønlandi. Okkurt hendingaárið, eitt nú seinast í 50-unum, vóru ísviðurskiftini til vildar og var nógv toskaveiða í Eysturgrønlandi.

Føroyingar hava eisini gjørt ymsar royndir í Eysturgrønlandi gjøgnum árini, men tað hevur ikki eydnast so væl. Tey broyttu ísviðurskiftini við Eysturgrønland í ár hava nú gjørt, at skip fáa roynt heilt norður um 67. breiddarstig.

Skerdir veiðumøguleikar

Veiðumøguleikarnir hjá føroyskum rækjuskipum eru nú nógv skerdir fyri hvørt ár. Kvotan, vit hava í Vesturgrønlandi í ár, er bert 1880 tons. Hetta skulu tey 17 rækjuskipini býta millum sín — so lítið verður í part.

Men ein partur av avtaluni við donsku stjórnina og EEC um rækjuveiðu í Grønlandi er royndarfiskiskapur í Eysturgrønlandi. Vit hava loyvi at veiða við 13 skipum samstundis. Tá so Vesturvarði legði leiðina eystur um Kappan og fór at trola eftir rækjum á leiðini um 67. breiddarstig, vísti tað seg at vera nógv av rækjum har. Síðani eru onnur føroysk rækjuskip farin á royndarfiskiskap í Eysturgrønlandi og somuleiðis nógv norsk skip.

Betur prísur

Fiskiskapurin sigst vera góður, og tað fæst eisini betur prísur fyri hesar rækjurnar enn tær vestanfyri. Birgir Danielsen, fiskasølustjóri, sigur, at teir higartil hava fingið 120 tons heim undan Eysturgrønlandi. Hann vísir á, at prísurin fyri hesar rækjur liggur umleið 2 kr. omanfyri prísin á vesturgrønlandsrækjum.

Hetta kemst av, at rækjurnar eru munandi størri. Meðan tað í miðal fara umleið 80 rækjur uppá kilo í Vesturgrønlandi, fara tað einans 60 rækjur eystanfyri. Harafturat kemur, at rækjurnar eru nógv reyðari og hava sterkari smakk.

Roknaði við 3 kr. meira

Fiskasølustjórin sigur annars, at teir høvdu roknað við at fáa eitt sindur meira enn tær 20—21 kr. fyri kilo. Norðmenn fiskaðu eini 300 tons í Eysturgrønlandi í fjør, og ein íslendskur bátur hevur roynt í nøkur ár. Tað hevur verið stórur kravgangur eftir hesum rækjunum og hevur prísurin ligið heilar 3 kr. omanfyri prísin á vanligu rækjunum.

— Nú verður so kanska talan um fleiri túsund tons, so tað er óvist um tann prísurin heldur, sigur Birgir Danielsen viðari.

Hann vísir annars á tann møguleikan, at verður nógv veitt av rækjum í Eysturgrønlandi, so kann hugsast, at hesar rækjur verða mettar sum normalstødd, og verða rækjurnar vestanfyri tá mettar sum smáar — og fáa tær tá minni prís enn í dag.

Trý føroysk rækjuskip fiska uppá licens frá Kanada í Vesturgrønlandi. Tey eru Fame, Hviltenni og Høgifossur. Tey flestu av hinum skipunum reka royndarfiskiskap í Eysturgrønlandi. Sólborg, sum fekk rættiliga stóran skaða herfyri, verður væntandi liðugur frá skipasmiðjuni í Noregi í mai.

Gjøllari kanning!

Hvat viðvíkur royndarfiskiskapi eftir rækjum í Eysturgrønlandi, so hava danskir og grønlendskir myndugleikar tosað um at fyriskipa eina meiri gjølliga kanning av rækjustovninum í Eysturgrønlandi. Heðin Klein, landsstýrismaður, upplýsir fyri Sosialinum, at tað hevur eisini verið vist á, at føroyingar skulu luttaka í hesum kanningararbeiðinum. Hann vísir tó á, at landsstýrið hevur ikki fingið nakað meira konkret at vita, hvat hesar kanningar skulu fevna um og hvør luturin hjá føroysku rækjuskipunum skal vera í hesum sambandi.

— Vit rokna sjálvandi við at fáa nakað at vita um hetta skjótt, sigur landsstýrismaðurin.

Tað er sum er annars eingin avmarkað veiðunøgd ásett í Eysturgrønlandi. Grønlendska fiskimarkið gongur norður á 67. breiddarstig. Norðanfyri er friur sjógvur, t.v.s., at her kunnu øll skip fiska.

Rækju við Brasilia


Fleiri av føroysku reiðarunum á rækjuskipum hava annars kannað, hvørjir møguleikar eru hjá okkum at fiska rækjur í suðuratlantshavinum við strendur Guineau Bissau og Brasilia og Surinam. John Dam, skipari, er ein teirra, sum hevur verið og kannað hesar møguleikar. Hann hevur verið í Brasilia og Surinam og fekk har at vita, at hann kundi veiða rækjur á djúpum vatni í teirra sjógvi.

Uppá fyrispurning um hetta verður til nakað, sigur John Dam, at einki er til hindurs fyri at royna har suðuri. Men enn vita vit einki um rækjur eru á djúpum vatni har. Okkurt bendir tó á hetta — og talan er helst um væl størri rækjur enn tær í Grønlandi.

John Dam sigur annars, at tað enn er óvist, um teir fara har suður at royna í ár. Í løtuni reka skipini jú royndarfiskiskap í Eysturgrønlandi og veiða kvotuna í Vesturgrønlandi.

— Er tað ikki ein ov langur teinur hjá føroyskum skipum at fara heilt suður til Brasiliu at veiða?

— John Dam: — Tað er langt at fara, men vit eru uttan iva noyddir at gera okkurt. Tá vit verða útistongdir á verandi fiskileiðum, eru vit noyddir at fara aðrar vegir.



Pilurin vísir Dohrnbanka, har rækjur eru at fáa. Dohrnbanki liggur bæði á íslendskum og grønlendskum sjóøki. 67. breiddarstig gongur ígjøgnum bankan. Norðan fyri 67 stig er altjóða sjóøki. Tosað verður annars um at viðka grønlendska fiskimarkið til eisini at fevna um havið norðan fyri 67 stig

Nývaldi formaðurin í Føroya arbeiðarafelag:

— Skifti ikki ham sum fakfelagsleiðari

— Eg havi eina nevnd uppá 6 limir aftanfyri meg. Tað, sum eg komi at gera, komi eg ikki sjálv at avgera. Tað verður tað, sum nevndin blívur samd um saman við mær.

Eg fari at leggja dent á eitt gott samarbeiði við nevndina. Eg havi bert sitið í henni í trý ár, so eg havi nógv at læra enn.

Men eg ætli ikki at skifta ham sum fakfelagsleiðari. Eg havi framvegis somu hugsjónir.

Soleiðis svarar nývaldi formaðurin í Føroya arbeiðarafelag, Ingeborg Vinther, spurninginum, um felagið nú fer at reka ein harðrendari fakfelagspolitikk.

Ingeborg Vinther, sum er ein av teimum meira vittgangandi fakfelagsleiðarunum í Føroyum, bleiv á aðalfundinum hjá F.A. leygardagin vald til formann við 72 atkvøðum. Hitt valevnið, Arni á Rógvi, fekk 43 atkvøður.

Dagpeningaskipanin virkar ikki

Ingeborg Vinther sigur, at hon fer at legga doyin á at arbeiða saman við nevndini til frama fyri arbeiðarastættina í Føroyum.

— Eg fari eisini at leggja stóran dent á at betra støðuna hjá arbeiðsfólkinum, ikki bara í krónum og oyrum, men eisini sosialt.

— Hvat hugsar tú um her til dømis?

Dagpeningaskipanin virkar ikki sum hon skal. Lógin er ikki so effektiv, sum man skuldi trúð, hon var. Til dømis er fritiðarlønin ikki við í skipanini. Ein arbeiðari, sum er sjúkur í kanska triggjar mánaðir, missir fritiðarlønina fyri hesa tíðina. Hetta má broytast.

— Kemur broytingin í pristalinum at ávirka samráðingarnar, sum nú eru byrjaðar?

— Sjálvandi mugu vit fáa nakað aftur av tí, vit hava mist.

Politikararnir siga, at fakfeløgini hava ikki skilt uppskotið um broytingina í pristalslógini. Tað er hart at hoyra. Tað er ein bilig umbering.

— Men royna politikarnir ikki at geva tykkum samsýning á annan hátt. Barnafrádrátturin er t.d. hækkaður?

— Tað tykist, sum teir royna at skava útyvir, men tað virkar á okkum sum ein táta.

Og nýggja pristalslógin. Tað er eisini eitt sosialmál.

— Tú gjørdi vart við teg, tá uppskotið um broytingina í pristalslógini kom frá landsstýrinum. Kann hetta hava havt ávirkan á formansvalið?

— Tað kann eg ikki svara uppá. Tað veit eg ikki. Vit royndu, tað vit kundu fyri at ávirka løgtingið, men tað bleiv yvirhøvur ikki tikið til eftirtektar. Tað er eitt vónbrot fyri okkum sum fakfelagsleiðarar. Man stillar ein mann upp fyri arbeiðarastættina og arbeiðir fyri at fáa hann inn, tí man roknar við, at hann kemur at vera til gagns fyri arbeiðsfólkið. Men tað visir seg, tá teir koma inn at siga, so gloyma teir alt.

Tá man hevur sett sítt álit á hesar menn og teir so gera eina gerð sum ta við pristalinum, so haldi eg ikki, teir eru verdir at verða valdir inn aftur.

Tann politikkur, sum javnaðarflokkurin og tjóðveldisflokkurin føra í dag, hevur onki við arbeiðarapolitikk at gera. Tað eru vit púra samd um innan fyri fakfeløgini.

— Er nakað annað hjá arbeiðsfólkinum at velja?

— Tað kann annað fólk stillast upp, ella teir, sum sita, kunnu broyta politiska kós.

— Fara arbeiðararnir nú at venda javnaðarflokkinum og tjóðveldisflokkinum bakið?

— Nøkur gera tað og nógv velja ikki somu menninar aftur.

— Verður pristalið ikki gloymt, tá løgtingsval er aftur?

— Tað haldi eg ikki. Mín erliga meining er, at tey skulu ikki fáa loyvi at gloyma tað. Man má minna tey á, hvat bleiv gjørt móti arbeiðarastættini tann 6. mars 1980.

Ingeborg Vinther sigur, at onnur mál, F.A. fer at arbeiða við, eru m.a. Arbeiðseftirlitið. Tað virkar ikki sum tað skal, tí tað hevur alt ov lítið av peningi at arbeiða við.

Eitt annað er skeiðvirksemið. Miðað verður móti, at fakfeløgini fáa sínar egnu útbúnu fólk, sum kunna vera lærarar á hesum skeiðum.

— Tað hevur eisini ligið mær sterkt á hjarta at savna allar arbeiðararnar í eitt felag. Arbeiðarafeløgini hava ikki ráð at standa so spjadd, sigur Ingeborg Vinther, nývaldi formaðurin í Føroya arbeiðarafelag.